# Stýrisfundarbók FKF

## 23-08-2011 / 9

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10:00

*Fundur lokin kl:* 13:30

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Erik Davidsen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | Ikki møttur. |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

**Fundarmál nr: 39**

FKF Jour. nr: 09-018

Reist av: Ferðslubólkinum

Fundarmál: Umboðan, tilboð um

Málslýsing: Í telduposti dagf. 7. juni, bjóðar Ferðslubólkurin felagnum at vera umboðað í bólkinum. Sí skjal 39, fundarfrásøgn og teldupostasamskifti.

Ferðslubólkurin er eitt úrslit av einum bólki, sum varð settur saman av fleiri stovnum í samband við klippikortsskipanina. Umboðini eru frá Innlendismálaráðnum, Akstovuni, Landsverk, Ráðnum fyri Ferðslutrygd og politinum. Bólkurin helt fram at koma saman at viðgera ferðslumál og viðgjørdi m.a. Nýggju ferðslulógina, sum kom í gildi 1. oktober 2009.

Avtalað er, at minst tveir fundir verða hildnir árliga. Tá arbeitt verður við átøkum verða fundir hildnir eftir tørvi. Øll, sum eru í ferðslubólkinum eru í arbeiði og umboða ein stovn og fundir verða hildnir í vanligari arbeiðstíð og tí er eingin, sum fær fundarsamsýning. Tað er einki ásett um, hvussu leingi nakar situr í bólkinum. Tað gera tey sjálvi av ella stovnurin, sum tey umboða.

Fundarsamtykt: Asbjørn Djuhuus valdur at umboða felagið. Eykalimur: Erik Davidsen, Sørvági

*Støða: Avgreitt.*

**Fundarmál nr: 40**

FKF Jour. nr: 09-148

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Drekkivatn, kunngerðaruppskot

Málslýsing: Í telduposti dagf. 12. juli, bjóðar VMR felagnum at viðmerkja uppskot til kunngerð um drekkivatn. Sí skjal 40.

Skrivstovan hevur ikki viðmerkingar til kunngerðaruppskotið, sum má síggjast sum avleiðing av lógini. Til at bera kostnaðin av kunngerðini, eiga kommunurnar nú at umhugsa, at taka gjald fyri vatnveitingina.

Fundarsamtykt: Taka upp aftur á næsta fundi. Heita á Jákup Magnussen hjá NomaTek at greina uppskotið; fíggjarligar og aðrar avleiðingar fyri kommunurnar, lýsing av teknisku síðuni av málinum.

*Støða: Freist 15. sept. Bíðað eftir viðmerkingum frá Jákup Magnussen.*

**Fundarmál nr: 41**

FKF Jour. nr: 09-143

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Elorkuøkið - heildarætlan

Málslýsing: Í telduposti dagf. 15. augusti, bjóðar VMR felagnum at viðmerkja uppskot til kunngerð um drekkivatn. í postinum verður sagt frá, at roknast kann við, at tað í næstum fer at verða samskift millum Vinnumálaráðið og tykkum um heildarætlanina. Eingin freist er til viðmerkingar. Sí skjal 40.

Fundarsamtykt: Umrøðan tikin upp frá fundinum 18. august, við framløgu frá Kára Thomsen á Agenda stovuni um málið.

At taka upp aftur á næsta fundi.

*Støða: Í bíðistøðu.*

**Fundarmál nr: 42**

FKF Jour. nr: 09-149

Reist av: Tilbúgvingarstovninum

Fundarmál: Tilbúgvingarráð, umboðan

Málslýsing: Í telduposti dagf. 20. august, bjóðar Tilbúgvingarstovnurin felagnum at viðmerkja uppskot til samanseting av umboðum í eitt tilbúgvingarráð. Sí skjal 42.

Fundarsamtykt: Stýrið heldur at felagið skal vera umboðað antin sjálvt ella saman við KSF. Kanna áhugan hjá KSF fyri at velja í felag ein lim.

*Støða: Í bíðistøðu.*

**Fundarmál nr: 43**

FKF Jour. nr: 09-019

Reist av: Formanninum

Fundarmál: Eitt felag, umboðan í nýggjan arbeiðsbólk

Málslýsing: Samb. avtalu við KSF, velur felagið 2 umboð í arbeiðsbólk, at arbeiða við bygnaðinum í nýggjum kommunufelag. Ætlanin er at hyggja at, hvussu norðurlensku feløgini er skipað politiskt.

Fundarsamtykt: Karl Olsen og Johan Christiansen.

*Støða: 1. Fundur ásettur 14. sept.*